Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Gjøld fyri havnaloðsingar

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at gjøldini fyri havnaloðsingar ikki eru broytt síðani 1. januar 2013?
2. Hvussu samsvara gjøldini fyri havnaloðsingar í Føroyum við gjøldini, sum eru galdandi í londunum uttanum okkum?
3. Hvat merkir tað fyri lønirnar hjá loðsunum, at gjøldini fyri havnaloðsingar ikki eru broytt í so langa tíð?
4. Hvør er orsøkin til, at lønirnar hjá loðsum ikki fylgja nøkrum sáttmála á arbeiðsmarknaðinum?
5. Eru ætlanir um at broyta hesi nevndu viðurskiftini?

Viðmerkingar:
Sambært løgtingslógini um havnaloðsing (løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 við seinni broytingum) skulu gjøldini, ið verða kravd fyri loðsingar, fíggja útreiðslurnar, sum kommunurnar hava av loðsskipanini. Tað vil siga, at útreiðslurnar kunnu ikki vera størri enn inntøkurnar, ið skipini rinda fyri loðsingina.

Í kunngerðini um loðsing, gjøld o.a. (kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012) verður ásett, hvat skip skulu rinda fyri at fáa loðs umborð. Men hóast kunngerðin kom í gildi tann 1. januar 2013, so eru gjøldini framvegis tey somu í krónum, sum tey vóru tá. Hetta merkir, at prís- og lønarvøksturin, sum hevur verið seinastu 12 árini, hevur ikki ávirkað hesi gjøldini.

Lønin, sum loðsarnir fáa, er ikki knýtt at nøkrum lønarsáttmála, og lógin sigur, at gjøldini skulu fíggja allar útreiðslurnar (eisini lønarútreiðslurnar). Men av tí at gjøldini fyri loðsing ikki eru broytt í 12 ár, er rásarúmið til at lata lønirnar fylgja lønarvøkstrinum í samfelagnum blivið minni og minni.

Hesin spurningurin verður settur fyri at varpa ljós á og fáa upplýsingar um hesi viðurskiftini.

Á Løgtingi, 6. juni 2025

Helgi Abrahamsen